# Smyril sleppur aldrin at troka Norrønu og Skipafelagið burtur

**Jóannes Eidesgaard er rættiliga innbilskur, tá ið hann heldur, at tað besta er at flyta Norrønu úr Havnini, so at nýggi Smyril kann fáa fast atløgupláss í Havn, heldur borgarstjórin**



SUÐUROYAR-SIGLINGIN
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin. fo*

– Vit vilja fegin geva Smyrli góðar umstøður í Havn. Men tað kemur ikki upp á tal at troka Norrønu og Skipafelagið burtur fyri at útvega atløgupláss til nýggja Smyril.

Jan Christiansen, borgarstjóri í Havn, er rættiliga avgjørdur.

Í Sosialinum í gjár helt løgmaður, at besta loysnin hevði verið at landið yvirtekur ferjuhavnina, sum er gjørd til nýggju Norrønu, so at nýggi Smyril kundi fáa fast atløgupláss har.

Hann helt eisini, at Tórshavnar Havn er ov lítil til nýggju Norrønu og at tað tí var rættast at finna henni annað atløgupláss uttanfyri Havnina.

– Eg haldi, at tað er rættiliga innbilskt av sjálvum løgmanni at siga, hvat vit skulu gera ella ikki, sigur Jan Christiansen, borgarstjóri.

Hann sigur, at var talan um ein lokalpolitikara, sum vildi skora nakrar atkvøður, kundi tað verið.

– Men eg haldi ikki, at hetta sømdi seg fyri Føroya løgmann, sigur borgarstjórin í Havn.

### Ein stórur trupulleiki

Jan Christiansen leggur eisini dent á, at tey hava hugsað bæði væl og leingi um, hvussu tað skuldi bera til at geva Smyrli so góðar umstøður í Tòrshavnar Havn, sum gjørligt.

– Og vit halda, at loysnin, sum vit hava funnið, har vit leggja Smyril uttaná Norrønu, er ein góð loysn.

Men so krevst, at loyvi fæst at dýpa framvið Tinganesi.

Men tað er langt frá vist, at tað fæst loyvi til tað, tí fornminnafelagið mælir landsstýrismanninum í mentamálum til at økisfriða Tinganes heilt út á 10 metra dýpi.

Møguliga skuldi landsstýrismaðurin taka endaliga støðu eftir at Sosialinum var farin til prentingr í gjár, men í farnu viku segði hann við okkum, at alt bendi á, at hann fór at fylgja tilmælinum og at friða Tinganes.

Hann minnir á, at tað eru nakrir heilt fáir túrar um vikuna, at bæði Skipini eru í Havn ísenn.

– Teir allarflestu túrarnar, kann Smyril brúka atløguplássið hjá Norrønu.

Jan Christiansen sigur undir øllum umstøðum, at hetta er einasta loysn, Tórshavnar Havn hevur at bjóðað nýggja Smyrli.

– Verður hendan loysnin av ongum, hevur fyrst og fremst Strandferðslan ein stóran trupulleika, tí so hava vit onki fast pláss til nýggja Smyril.

Annars heldur borgarstjórin, at tað er løgið at løgmaður nú skjýtur upp at samráðast við Tórshavnar Kommunu um at yvirtaka ferjuhavnina hjá Norrønu.

– Vit hava í fleiri ár roynt at fingið tað almenna at betalt ein part av útbygginginí, sum kravdust til nýggja Smyril, men landsstýrið hevur hvørki verið til at høgt ella stungið í, hóast tað brúkar 65 milliónir til atløgupláss til skipið í Trongisvági.

– Men er landsstýrið sinnað at samráðast við okkum um havnaviðurskiftini, eru teir vælkomnir til tað, sigur borgarstjórin í Havn.

Hann sigur, at Tórshavnar Havn hevur arbeitt við nøkrum tankum um at útbyggja havnaviðurskiftunum í Kommununi.

– Tankarnir, vit arbeiða við, eru bæði at byggja út í Kollafirði, at byggja út inni á Sundi og at byggja ytra molan á Skansabryggjuni longri fyri at fáa eina góða havn uttanfyri molan.

Hann leggur tó dent á, at onki er avgjørt um nakað sum helst.

Men hinvegin leggur hann dent á, at tað kemur ikki upp á tal at troka Skipafeløgini ella Norrønu burtur fyri at geva pláss til nýggja Smyril.

– Meginreglan hevur alla tíðina verið, at ferðamannaskipini skulu inn ímóti Bursatanga og at restin av havnalagnum skal vera til farm.

– Skipafeløgini og Norrøna leggja nógvan pening eftir seg í Tórshavnar Havn og tað kemur ikki uppá tal, at flyta tey til frama fyri nýggja Smyrli.

Eitt annað uppskot, sum suðuroyingar hava nevnt, er, at gera ferjuskráa til nýggja Smyril í krókinum undir Havnarskrivstovuni og so at fáa skipini hjá Skipafelagnum at rykkja eina skipslongd longri út á molan?

– Tað kemur heldur ikki upp á tal. Skipafelagið hevur lagt alt sítt virksemi eftir at skipini liggja so nær goymsluni sum gjørligt og vit fara ikki at gera umstøðurnar hjá teimum verri.

Jan Christansen sigur, at tað verður eisini ein stórur trupulleiki í sambandi við tey altjóða krøv, sum havnir skulu lúka um stutta tíð og sum ásetir, at vatntætt skott er ímillum farmaflutning og ferðafólk.

# Hugsa ikki um aðrar møguleikar enn Havnina

**Óli Hammer,stjóri í Smyril Line, heldur at tað er ósømiligt, at nýggi Smyril ikki fær fast pláss í Havn**

TÓRSHAVNAR HAVN
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Óli Hammer, stjóri í Smyril Line, ætlar ikki at leggja seg út í kjakið um atløguviðurskiftini hjá Norrønu og nýggja suðuroyarskipinum.

– Tað er eitt mál, sum ikki liggur hjá okkum. Tað er eitt mál, sum eigur at viðgerðast á einum øðrum støði og tí fari eg ikki at gera viðmerkingar til tað, sigur Óli Hammer.

Sostatt vil hann heldur ikki gera viðmerkingar til hugsanina hjá løgmanni um at lata landið yvirtaka atløguplássið hjá Norrønu í Havn til nýggja Smyril, so at ein loysn kann finnast fyri Norrønu onkra aðrastaðni.

Tað einasta, hann vil siga, er, at Smyril Line hevur fyrireikað seg uppá at sigla uppá Havnina og at teir ikki hava aðrar ætlanir. Hann sigur eisini, at Norrøna er smíðað hareftir við so mikið stórari maskinorku, at hon skal kunna manøvrera í Tórshavnar Havn í væl verri veðri enn gamla Norrøna kundi.

Nýggja Norrøna kann manøvrera í Tórshavnar Havn í vindi upp í 18-20 metrar um sekundið. Er verri veður enn tað, má Norrøna bíða.

Gamla Norrøna kláraði seg bara í upp til 12 metrar um sekundið.

Men yvirskipað ásannar stjórin í Smyril Line, at tað er ógvuliga óheppið, at nýggi Smyril ikki fær fast atløgupláss í Havn.

– Støðan hjá suðuroyingum er ikki góð. Tað er beinleiðis ósømiligt, at tey, sum skulu við nýggja Smyrli, ikki skulu vita, hvar báturin liggur, heldur hann.

Hann vísir eisini á, at í summar verða nýggjar, strangari reglar settar í gildið fyri havnir. Eftir nýggju reglunum skulu ferðafólk og farmur skiljast sundur og ferðafólk innanlands og ferðafólk uttanlands skulu eisini skiljast sundur.



*– Spurningurin um atløguviðurskiftini í Tórshavnar Havn er ikki okkara borð at viðgera, sigur Óli Hammer, stjóri í Smyril Line*



# Bíða eftir fíggjarlógini

**So skjótt fíggjarlógin er samtykt, verður heimið fyri sinnisveik latið upp í Sandavági. Starvsfólkini eru sett, og nøkur búfólk flyta beinanveg, opið er**

ALMANNAMÁL
*Edvard Joensen*

**Sandavági:**
Nú er klárt at flyta inn í heimið fyri sinnisveik, sum skal vera í Sandavági. Men nú verður bíðað eftir, at fíggjarlógin verður samtykt.

Signa Andreasen í Vestmanna er sett sum leiðari á heiminum. Hon sigur, at aftur at henni eru átta starvsfólk sett í starv. Enn eru starvssetanirnar bara munnligar, tí tað ber ikki til at geva fóki skrivliga fráboðan, fyrr enn hon veit, um nakrir pengar yvirhøvur eru til tess.

Av teimum átta starvsfólkunum, sum sett eru aftur at leiðaranum, eru seks kvinnur og tveir menn. Fýra teirra hava viðkomandi útbúgving, og hini, sum sett eru, hava dúgvar arbeiðsroyndir at taka av, sigur leiðarin. Seks av starvsfólkunum eru úr Vágum, og hini búgva á Streymoynni.

Einki av búfólkunum, sum í fyrsta umfari flyta inn í Sandavági, er úr Vágum, sigur Signa Andreasen. Talan er um fólk, sum flyta av psykiatrisku deild á Landssjúkrahúsinum, nú pláss er fyri teimum aðrastaðni. Hetta eru vaksin fók í aldrinum millum 35 og 55 ár, sigur leiðarin.



*Heimið fyri sinnisveik letur upp í Sandavági, so skjótt fíggjarlógin er samtykt. Starvsfólkini eru sett, og fyrstu búfólkini eru klár at flyta inn*
*Mynd: Edvard Joensen*

Hesi fólkini eru kropsliga væl fyri, og kunnu tí taka hond í eitthvørt arbeiði, sum kann bjóðast teimum. Tó eru tey sinnisliga so mikið veik, at tey hava tørv á, at fólk er um tey alt samdøgurði.

Signa Andreasen sigur, at eitt, sum hesum fólkunum dámar sera væl, og sum tykist hava góða ávirkan á fólk í teirra støðu, er at sleppa at ríða. Eisini hevði verið ynskiligt at fingið til dømis eitt jarðarstykki at dyrka, sigur hon.

Av øðrum tilboðum í oynni eru til dømis svimjing og møguliga pláss á varda verkstaðnum, sum nú kemur í Sørvági.

Tað er pláss fyr fimm búfólkum á heiminum í Sandavági. Men í fyrsta umfari eru tey bara trý, sum flyta inn.

# Kennir ongar smálutir

**Flogvallarovastin kenir einki til ætlanina um at flyta partar av løgregluni úr Vágum til Havnar**

MIÐSAVNING
*Edvard Joensen*

**Vágar:**
Hóast løgreglan hevur ábyrgdina av rygdini á flogvøllinum, hevur flogvallarovastin onga almenna fráboðan fingið um, at tað er upp á tal at flyta partar av løgregluni í Vágum til Havnar.

Í gjár skrivaði Sosialurin, at tað verður arbeitt við bygnaðarbroytingum í løgregluni, sum kunnu hava við sær, at partur av løgrelgumanningini í Vágum verður fluttur til Havnar.



*Løgreglan ehvur ábyrgdina av trygdini á flogvøllinum. har undir eisini kanning av tiemum, sum fara umborð á flogførini*

Finnbogi Niclasen, flogvallarovasti, sigur, at hann hevur hoyrt onkra hendinga leysasøgu, sum hann ikki kann taka fyri fult í so álvarsligum máli. Frá løgregluni hevur hann einki ítøkiligt fingið at vita, men væntar tó, at um tað kemur upp á tal at flyta part av løgregluni til Havnar, hevði hann helst frætt tað, áðrenn tað varð gjørt.

Finnbogi Niclasen sigur, at tað er løgreglan, sum hevur ábyrgdina av trygdini á flogvøllinum. Abreiðið, sum starvsfók á flogvøllinum ger í eitt nú trygdarefirlitinum, har ferðafólk verða kannað á veg umborð á flogførini, verður gjørt fyri løgregluna.

Flogvallarovastin leggur dent á, at hann hevur einki ítøkiligt fingið at vita um nakra broyting í arbeiðsgongdini hjá løgregluni á flogvøllinum, og kann tí ongar viðmerkingar gera til tað.

Ger nú kvettið 16. apríl
100 pør av buksum í ymiskum sniðum verða seldar fyri 99^95
Fyrr. prísir: 599,- 499,- 399,-
Bert fríggjadagin og leygardagin í Havn og í Klaksvík
Seytjan
Í Klaksvík Tel 456517
Í Tórshavn Tel 311305
Sosialurin